# Umhvørvið í kommununum á dagsskrá

Fríggjadagin 12. desember skipar Agenda 21 stovan fyri árliga kveikingardegnum á Hotel Hafnia. Fyrrapartin fundast kommunurnar um framtíðar umhvørvisarbeiði og aftaná døgurða er almennur kunningarfundur um Umhvørvisátakið, har umboð fyri fyrireikingar- og metingarnevndir greiða frá. Tikið verður samanum Umhvørvisátakið 2008 og komið verður inn á, hvussu ein kommuna kann fyrireika seg, um hon í 2010 ynskir at vinna heiðurin fyri at hava best røktu bygd. Tey, sum vilja luttaka á almenna partinum av kveikingardegnum seinnapartin kunnu møta á Parnassinum á Hotel Hafnia kl. 13. Á fundinum verður kaffi og ábit.



# Milliónir til gransking

Granskingarnevndin hevur játtað næstan 7,4 milliónir krónur í stuðli til 12 granskingarverkætlanir í 2008. Talan er um Ph.D. og aðrar verkætlanir innan økini mentan, náttúru og náttúrutilfeingi og heilsu. Sambært heimasíðuni hjá Granskingarráðnum, komu tilsamans 39 umsóknir inn, og søkt varð um tilsamans góðar 30 milliónir krónur. Tilsamans verða 2.629.662 milliónir krónur játtaðar til økið mentan, 3.903.675 milliónir til náttúra og náttúrutilfeingi og til heilsuøkið tilsamans 834.135 krónur. Játtaðar eru í alt 7.367.472 krónur í 2008.

# Seta sítt álit á Kúlubøkuna



*Umboð fyri StatoilHydro bólkin í triðju útbjóðing. Frá vinstru: Regin Hammer, DONG, Nils Sørensen, Faroe Petroleum, Rúni Hansen, StatoilHydro, Wilhelm Petersen, Atlantic Petroleum, og Garreth Allinson, leitistjóri hjá StatoilHydro í Føroyum*
*Mynd: Jan Müller*

**Leitistjórin hjá StatoilHydro fyri Føroyaøkið, Garreth Allinson er fegin um nýggjasta leitiloyvi í ein landnyrðing úr Føroyum. Hann heldur møguleikar vera fyri at finna elefantar í økinum, sum á oljumáli eru risastórar olju- og gasskeldur. Ein er Kúlubøkuleiðin norðaliga við markið.**

3. ÚTBJÓÐING

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

- Vit eru framvegis sera bjartskygdir um, at tað kunnu finnast olju- og gasskeldur í føroysku undirgrundini. Tað eru bara boraðir seks brunnar her, meðan tað eru boraðir fleiri enn 200 brunnar beint í grannalagnum, vestan fyri Hetland. Vit megnaðu at bora gjøgnum basalt á Brugduleiðini, hóast vit ikki komu nóg djúpt. Og heldur ikki BP megnaði at koma nóg djúpt niður til møgulig oljuberandi løg. Hetta sigur leitistjórin hjá StatoilHydro á Føroyaøkinum, Garreth Allinson.

Sjálvur hevur hann verið við í oljuleitingini við Føroyar frá byrjan. Hann er jarðfrøðingur og hevur verið í hesi vinnu í meira enn 30 ár, helvtina av tíðina hjá BP og helvtina hjá Statoil. Hann hevur tí sum ein av teimum fáu jarðfrøðingunum kunnað fylgt allari leitilgongdini bæði vestan fyri Hetland og eystan fyri Føroyar øll hesi árini.

Hóast tað ikki eydnaðist hjá Statoil at gera oljufund í báðum brunnunum, sum eru boraðir í føroyskum øki, so er Garreth næstan vísur í, at kolvetni finnast og entá í stórum nøgdum.

Jarðfrøðingar sum Garreth eru komnir til, at tað finnast ómetaliga stórir strukturar, sum kunnu goyma olju og gass í føroysku undirgrundini. Og Garreth Allinson dylur ikki fyri, at teir eru í Føroyum fyri at leita eftir elefantum, sum er tað orðið í oljumáli, sum merkir ein risastór olju- ella gasskelda.

Hóast elefanturin verður brúktur í oljumáli kring heim, so hevur StatoilHydro valt at uppkalla øll økini í undirgrundini, har teir halda kolvetni kunnu goyma seg (strukturar) eftir hvalasløgum, í hesum føri stórhvalum. Í økinum í ein landnyrðing úr Føroyum, sum StatoilHydro hevur fingið tillutað í nýggjastu útbjóðingini, finst ein slíkur strukturur, sum verður nevndur Kúlabøkan, ein av teimum heilt stóru hvalunum. Nøvnini StatoilHydro brúkar eru m.a. Sildrekin, Brugdan og Døglingurin.

- Hvør veit, kanska ein av hesum ber eydnuna við sær. Tað vildi verið fantastiskt leggur oddajarðfrøðingurin hjá StatoilHydro aftrat.

*– So framtíðin finst kanska har norðuri?*

- Ja hvør veit. Vit hava eisini loyvi, sum liggja nærhendis, ið vit fingu tillutað í 2. rundu. Har umhugsa vit at bora í 2010. Vit hava tó ikki enn avgjørt, hvar vit skulu bora í hesum loyvunum.

Anne Marie brunnurin hjá ENI, sum verður boraður næsta ár, sær sera áhugaverdur út. Og verður olja funnin har, so fer alt annað eisini at síggja spennandi út. Chevron fer helst at bora í sínum loyvi í føroyskum øki í 2010, har StatoilHydro er partnari, so tað sær kanska ikki so galið út við føroysku oljuframtíðini sigur Garreth Allinson við Sosialin.

Sony Ericsson G502i

Jólagáva til undirhald

Fartelefon við flest øllum hentleikum, so sum 3G, 2MP myndatóli, Bluetooth, 32MB minni, møguleika fyri at byggja minni út við M2 korti, FM-útvarpi og TrackID music recognition. Battarí: 10 tímar talutíð og 340 tímar standby. Phonearena gav hesari telefonini 8 stig av 10 møguligum í test tann 05-06-2008.

Les meira á vodafone.fo
Vit eru eisini til tænastu á 202020.



kr. 1395
Vanligur prísur 1.595,-

Løtan er tín

vodafone